# Æðratræðing

Æðratræðing er ein røntgenkanning, ið er gjørd til at meta um støðuna hjá æðrini. Litevni verður spænt gjøgnum æðranar, sum síðani verður røntgenmyndað. Er æðrin trong ella hevur tað hug til at tippast í henni, ber tað til í ávísum førum at viðgera vandamálið samstundis, sum kanningin verður gjørd. Royking er vandamikil og ger mótstøðuførið í kroppinum veikari, og hon ávirkar virksemið í æðrunum. Royking minkar um møguleikan fyri at fáa eitt langtíðarinntriv við æðraviðgerð at eydnast væl. Fá tær ráðgevng hjá einum ráðgeva, sum kann hjálpa tær at leggja av.




## Fyrireiking til kanning

**Tú verður biðin um at møta á skurðambulatoriinum á Landspítalið í Fossvogi, B 3 (3. hædd), har ein journalupptøka verður gjørd.Tekur tú heilivág regluliga, verður tú biðin um at taka hann við.**

- Viðtala og kanning hjá hjálparlækna á æðraskurðdeildini
- Blóðroynd og hjartarit
- Viðtala við sjúkrarøktarfrøðing

Um tú ikki tolir ávísan heilivág, ella um tú hevur ovurviðkvæmi, eitt nú av røntgenlitevnum, skalt tú endiliga siga frá. Innskrivingin tekur uml. 2-3 tímar.

Tekur tú heilivág fyri sukursjúku, eitt nú Glugophage ella Glucobay, ella tekur tú blóð-tynnandi heilivág, magnyl/hjartamagnyl, er neyðugt at gevast við tí, áðrenn kanningin verður gjørd. Hetta verður gjørt í samráð við skurðlæknan.

## Kvøldið undan kanningina

Blóðtynnandi heilivágur verður givin undir húðina, fyri at forða fyri blóðtøppi.

### Føsta

Umráðandi er, at magasekkurin er tómur áðrenn kanningina.

- Tú mást ikki eta 6 tímar undan æðratræðingini. Mælt verður til bert at eta ein lættan nátturða og lætta føði, áðrenn tú leggur teg kvøldið fyri æðratræðingina fyri at minka árin av at fasta.
- Klárir drykkir kunnu drekkast í smáum í upp til tveir tímar undan æðratræðingini. Klárir drykkir eru luktleysir drykkir við ongum feitti og ongari mjólk í, eitt nú vatn, klár fruktsaft, ( við ongum frukttrægrum), te og kaffi. Umráðandi er ikki at roykja ella brúka annað tubbak, tyggja tyggigummi seinastu 2 tímar undan æðratræðingini.
- Narkosulæknin ella narkosusjúkrarøktarfrøðingur tekur støðu til, hvønn heilivág tú skalt taka undan kanningini.

Tá tú verður útskrivað/-ur, skal búgvið fólk fylgja tær og verða hjá tær heima. Tú mást ikki koyra bil ella annað akfar sjálv/-ur. Hetta er galdandi alt tað fyrsta samdøgrið aftan á kanningina.

**Tú skalt fara í brúsu um morgunin dagin, sum kanningin fer fram.** Neglalak og andlitssmyrls skal takast av, deotorant, krem, oljur ella annað luktilsi má ikki verða smurt á húðina undan kanningini. Best er at lata skart og skreyt og annað virðismikið stás liggja eftir við hús. Alt til persónligt reinføri, inniskógvar og morgunkápu skalt tú hava við. Tað ber at nýta fartelefon. Hon skal tó vera ljóðleys og ikki til ampa fyri onnur.

## Kanningardagin

**Tú ert biðin um at møta á Ambulatoriium A5 í Landspítalið í Fossvogi ( 5 Hædd), fastandi um morgunin sjálvan kanningardagin.**

- Ein plastnál verður løgd í eina æðr í arminum, har væta verður latin í.
- Tú verður rakað/-ur í lærkreppingini, (lyskuni)

Kanningin verður gjørd á Røntgenstovuni og tekur uml. 1-2 tímar. Stungustaðið verður doyvt, har nálin verður løgd. Sum oftast er tað í lærkreppingini. Annars verður nálin løgd í handarbakið. Umráðandi er at liggja púra still/-ur meðan kanningin verður gjørd. Ein sonevndur katetur verður lagdur gjøgnum æðrarnar frá lærkreppingini, sum síðan verður røntgenmyndað. Vanligt er, at tað kennist heitt, tá litevnið verður sprænt ígjøgnum æðrarnar. Aftan á kanningina verður kateturin tikin burtur, og trýst verður lagt omaná sárið fyri at minka um vandan fyri bløðing. Eftir kanningina verður tú beinleiðis flutt/-ur aftur á

deildina A5. Fyri at skurðsárið í lærkreppingini kann grógva aftur, er tað umráðandi at liggja púra still/-ur í nakrar tímar á rygginum, og ikki at lyfta høvdinum ella fótinum upp frá. Bind verður lagt omaná sárið teir fyrstu tímanar fyri at minka um trýstið. Eftir, at bindið er tikið burtur, verður tú liggjandi ein tíma í seingini. Ein sjúkrarøktarfrøðingur hevur eyguni eftir stungustaðnum og bløðing úr tí. Um eingin bløðing er úr sárinum, verður tú útskrivað/-ur sama dag, sum kanningin er gjørd

| Aftan á kanning: | Áðrenn útskriving fært tú: |
|---|---|
| • Pinustillandi heilivágur verður givin regluliga.<br>• Tú kanst drekka okkurt, tá tú kemur á deildina. Aftan á, at bindið er tikið burtur, kann tú byrja at fáa tær at eta.<br>• Tú verður liggjandi nakrar tímar aftan á kanningina. Hetta verður gjørt í samráð við læknan.<br>• Neyðugt er, at landbløðran tømir seg, áðrenn tú verður útskrivað/-ur. | • Kunning og vegleiðing viðvíkjandi heimferð.<br>• Ávísan fyri blóðtynnandi heilivági, um tørvur er á tí<br>• Tíð til eftirkanning hjá æðraskurðlæknanum. |

## Útskriving

### Pína

Aloftast er eingin pína frá stungustaðnum. Sum oftast hjálpir tað at taka heilivág fyri pínu, ið kann keypast á apotekinum. Bið um vegleiðing frá læknanum ella sjúkrarøktarfrøðinginum.

### Stungustaðið

Verður bind lagt á stungustaðið, verður bindið tikið burt tveir dagar aftaná.

### Rørsla

Mælt verður til at tú ert úthvíld/-ur kanningardagin. Umráðandi er at geva sær stundir at hvíla seg og taka sær av løttum í eina viku aftan á kanningina.

### Aftur til arbeiðis

Vanligt er, at ein verður sjúkrafráboðaður í 2-3 dagar. Hevur tú tungt likamligt arbeiði, má roknast við longri sjúkrafráboðan. Minst til at biðja um sjúkraváttan, um tú tørvar hana.

## Hjáárin

Møguligt hjáárin kann verða við bløðing úr sárinum í lærkreppingini. Í ávísum førum kann/kunnu vit síggja eina æðrabungu.

**Dagdeild A5 er A5 er opið allar gerandisdagar frá kl. 07:00 til 22:00.** Aftan á afturlatingartíð skal ringjast til Landspítalin tlf. 543- 1000 og biðjast um at fáa samband við hjálparlæknan á æðraskurðdeildini í Landspítalið í Fossvogi..

**Set teg ið samband við æraskurðdeildina:**

- Um bløðing er úr stungustaðnum, ella eitt skjótt vaksandi blóðmeltað merkið, tá er umráðandi at hvíla, leggja trýst omaná stungustaðið, og ringja eftir einum sjúkrabili
- Um ein bunga kemur til sjóndar í lærkreppingini (um tú kennir eina kúlu undir stungustaðnum)
- Um pínan heldur fram, hóast tú tekur heilivág fyri pínu
- Um tú fært hægri fepur enn 38,5°
- Um skurðsárið verður reytt ella hovnar

## Telefonnummur:

| | |
|---|---|
| Innskrivingarmiðstøðin G3 | 543 2060 |
| Ambulatoriið A5 er opið alla gerandisdagar frá kl. 07:00 til 22:00 | 543 7570 |
| Viðrakning | 543 7905 |
| Skrivarin á Æðraskurðdeildini | 543 7464 |

**Um tú ella ein av tínum avvarðandi hava spurningar, eru tit vælkomin til at ringja.**

Við ynskjum um skjótan og góðan bata.
Starvsfólkið á dagdeildini A 5

Vinaliga hav í huga, at sjúkrahúsið ikki tekur ábyrgd av peningi ella øðrum virðislutum, sum fartelefonum, teldum o.ø., sum sjúklingurin ella avvarðandi hava við sær.

Gevið gætur, at starvsfólk og næmingar á sjúkrahúsinum eru bundin av tagnarskyldu og mugu tí ikki tosa við teg ella onnur um viðurskifti hjá sjúklingum á deildini. Tí biðja vit teg og avvarðandi tíni um ikki at tosa um tað, sum tit kunnu vera vitni til ella hoyra um aðrar sjúklinga á deildini.

Landspitalið er frálærusjúkrahús, og næmingar í sjúkrarøkt fáa ein part av læru sínu í Landspitalinum. Næmingar fylgja við og taka lut í dagligu viðgerðini av sjúklingum og eru altíð undir ábyrgd og vegleiðing av leiðbeinara sínum.

ÚTGEFANDI:
LANDSPÍTALI
SKURÐLÆKNINGASVIÐ
JANÚAR 2013

ÁBYRGÐARMENN:
YFIRLÆKNIR OG DEILDARSTJÓRI
ÆÐASKURÐLÆKNINGADEILDAR

ÞÝÐING:
MAJBRITT VESTERGAARD
HØNNUN:
KYNNINGARMÁL LSH/ÁJC